LØGTINGIÐ

**Starv sum løgfrøðingur í Løgtinginum**

Eitt fulltrúastarv sum løgfrøðingur í Løgtinginum er leyst at søkja til setan frá 1. apríl 2022.

Uppgávurnar í løtuni fevna m.a. um:

- at vera nevndarskrivari í Trivnaðarnevndini og Útnorðurráðnum umframt møguligum øðrum nevndum
- at vera løgfrøðiligur ráðgevi hjá flokkum og tingmonnum í sambandi við lóggávuarbeiði
- at luttaka í vanligari málsviðgerð og umsitingarligum uppgávum

Talan er um eitt fulltíðarstarv, sum til tíðir er rættiliga krevjandi, og har nógv er at gera og at halda skil á. Tann, sum settur verður, skal hava útbúgving sum løgfrøðingur (Cand.jur.), hava góðan kunnleika til føroyskt mál, áhuga fyri at arbeiða í politisku skipanini og góðan kunnleika til nýtslu av teldu. Kunnleiki og royndir frá arbeiði í Løgtinginum ella landsfyrisitingini kunnu vera ein fyrimunur.

Starvið verður lønt samsvarandi sáttmálanum millum Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya og Fíggjarmálaráðið.

Umsóknir saman við prógvum o.ø. skulu vera Løgtinginum í hendi í seinasta lagi 31. januar 2022, kl. 12. Umsóknir kunnu sendast við telduposti til starv@logting.fo ella við vanligum brævi til Løgtingið, Tinghúsvegur 1-3, Postboks 208, 110 Tórshavn.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Johnhard Klettheyggj, løgtingsstjóra á tlf. 520294.